# Nýggj skip: »Platformurin« gers

**At skipini, sum eru heimahoyrandi í Nes kommunu, gerast fleiri og fleiri í tali, setir eisini stór krøv til bygdaráðið, sum hevur til uppgávu at skapa karmarnar, so pláss er fyri øllum. – Á havnalagnum treingist meira og meira, og vit arbeiða tí við eini ætlan um at veksa um atløgusíðuna, sigur borgarstjórin, Símun Johannesen**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin var skipað fyri hátíðarligari móttøku á havnalagnum á Toftum, tá ið ein nýggjur Búgvi, bygdur úr stáli, kom í flotan fyri gamla Búgvan, sum er bygdur úr eik.

Tað er felagið, Sp/f Anana við Theodor Poulsen, sum eigur skipið, ið hevur verið heimahoyrandi í Grenå. Tveir aðrir eigarar eru eisini; teir eru bróður Theodor, Kjartan Poulsen og Jan Davidsen.

Búgvin er á somu støðd sum trolbáturin, Hansa Maria, sum ein triði bróður Theodor og Kjartan, Hans Andrias Poulsen, eigur.

Skrokkurin á nýggja Búgvanum er júst hin sami, sum skrokkurin á Varðanum, ið noyðoyingar eiga.

### Móttøka

Tað var rættiligur hátíðardámur á havnalagnum á Toftum leygardagin, tá ið nýggi Búgvin kom.

Hornorkestur spældi, og Kirkjukórið sang nakrar sangir. Fløggini veittraðu á fullari stong.

Borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen, helt røðu fyri skipi og manning.

Símun helt fyri, at tað grør um gangandi fót í Nes kommunu, tá ið ræður um fiskiskipaflotan.

– Skipaflotin her á staðnum er vaksin nógv seinastu tíðina. Millum jól og nýggjárs fekk enn eitt av teimum stóru línuskipunum heimstað her, og í dag heilsa vit nýggja Búgvanum vælkomnum.

Hann segði, at Morgunstjørnan er triðja línuskipið hjá P/F Eysturoy. Hini bæði eru Sigmundur og Eysturoyingur.

Borgarstjórin vísti á, at áræði og framsýni altíð hevur sermerkt fólkið á staðnum – ikki minst sjófólkið.

– Vit hava nógv arbeiðspláss á skipsdekki, og hetta eru stór aktiv fyri hetta økið.

Hann helt fyri, at stóra skipavirksemið rættiliga setir kommununa á kortið - til eina av teimum størstu innan línuskipavinnuna.

– Hetta setir eisini stór krøv til okkum, sum hava til uppgávu at skapa karmarnar, so pláss er fyri øllum.

Símun vísti á, at á havnalagnum treingist meira og meira við tí veksandi virkisemi, sum er, og umstøðurnar í dag eru ikki nøktandi.

– Vit arbeiða tí við eini ætlan um at veksa um atløgusíðuna, og vónandi byrjar hetta arbeiði um ikki ov langa tíð.

### Triði Búgvin

Borgarstjórin helt fyri, at heimferðin hjá Búgvanum mátti hava verið baldrut, tí veðrið hesar dagarnar hevði verið so vánaligt.

– Tit hava tí longu fingið eina fatan á, hvussu nýggja skipið roynist í slíkum líkindum.

Símun vísti á, at nýggi Búgvin er tann triði í røðini hjá toftamonnum.

– Sigast má, at hesir menn, sum eisini hava keypt onnur fiskifør fyri at fáa fleiri fiskidagar og ein størri "platform" at standa á, trúgva upp á framtíðina.

Borgarstjórin segði, at við nýggja Búgvanum – kunnu vit siga, at allur flotin hjá toftamonnum, sum um sumarnar hevur loyvi at fiska á landleiðini, er skiftur út.

– Træskipini eru nú skift út við stálskip, legði hann aftrat.



### Takksemi

Símun Johannesen segði, at fólk í kommununi eru sera takksom fyri øll tey vinnutól, sum eru komin til bygdar.

– Hesi vinnutól gera kommununa til eitt mennandi "kraftsentur" innan okkara høvuðsvinnu, fiskivinnuna, segði borgarstjórin.

Nýggi Búgvin er úr stáli og er bygdur í Hvidesande í Danmark í 2001. Hann hevur verið heimahoyrandi í Grenå.

Sáttmálaprísurin fyri nýggja Búgvan er upp á 7,3 miljónir krónur, men sum skilst á Theodori Poulsen, skulu spølini skiftast, áðrenn lagt verður út á hav.




*Hansa Maria, sum Hans Andrias Poulsen eigur, tók ímóti Búgvanum úti á vánni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Væl av fólki var til móttøkuna leygardagin; hornorkestur spældi, Kirkjukórið sang og borgarstjórin, Símun Johannesen, helt røðu*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*